# Fyrilestrar fyri allar bátaeigarar

**Sunnudagin kl. 16 bjóðar Føroya Shell og Tórshavnar Bátafelag øllum bátaeigarum í Føroyum til fjøltáttaðar fyrilestrar í hølinum hjá Starvsmannafelagnum í Tórshavn**

BÁTAR
*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*

Sunnudagin kl 16 verður eitt spennandi tiltak í hølinum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9, í Tórshavn. Tað er Føroya Shell, sum í samstarvi við Tórshavnar Bátafelag, ið skipar fyri hesum tiltaki, sum er ókeypis.

Skráin er bæði fjøltáttað og spennandi. Hanus Kjølbro, sum fyri stuttari tíð síðani gav bókina Veðurlæru út, kemur at siga frá ymiskum úr bókini. Veðurlæra, er fyrst og fremst ætlað at verða nýtt í undirvísing, men er eisini hent bók hjá øðrum, ið hava áhuga í veðurfrøði.

Hanus, sum er útbúgvin skipsførari, hevur hollar royndir sum sjómaður, og lærari á Klaksvíkar Sjómansskúla. Síðan í summar hevur hann starvast á Sjóvinnudeplinum í Havn.

Marius Magnusson, sum er dagligi leiðari á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík, kemur at siga frá um trygdina á sjónum. Virðingin fyri trygdini á sjónum, er tey seinastu árini blivin nógv størri millum manna, men enn síggja og hoyra vit um fleiri dømir um væntandi trygdarútbúna umborð á bátunum. Hetta kann um ringast veit við, hava sera óhepnar fylgir.

Umframt Marius og Hanus, koma eisini umboð fyri Fiskirannsóknarstovuna at hava eina framløgu um Snellu og Rúsuroyndir. Tað verða Bjarti Thomsen og Kristian Zachariassen, sum koma at tosa um royndir við ymiskum fiskarúsum út fyri Nólsoy, og royndir við snellu á Føroyabanka. Víst verður millum annað á, hvussu fiskur ber seg at, í og við eina fiskarúsu, og royndir við snellufiskiskapi - millum annað hvønn týdning liturin á beitunum hevur, og hvussu fiskur tekur á húkar.

Fleiri undirsjóvarupptøkur verða vístar. Tilmelding til tiltakið kann gerast á heimasíðuni hjá Tórshavnar Bátafelag – www.marina.fo. Avmarkað atgongd.



GÓÐ ETIKETTA KREVST

## Sölufólk til Föroya Bjór

Föroya Bjór er eitt nýmótans virki, sum luttekur í spennandi og avbjóðandi kapping við altjóða fyritökur. Á Föroya Bjór hava vit langt síðan skilt boðskapin um, at nýskapan og menniskjaligt tilfeingi er vegurin fram – og nú leita vit eftir tær.

**Arbeiðsuppgávur**
Hövuðsuppgáva tín verður at marknaðarföra og selja vörur hjá Föroya Bjór – alt frá vælkendu framleiðsluni til spildurnýggj produkt – har partur av starvinum er at samskipa marknaðartiltök og at seta tey í verk. Tú fert at arbeiða um allar Föroyar, við skrivstovu á Föroya Bjór í Havn.

**Útbúgving og förleikar**
Tú hevur royndir í yrkinum, dugir sölukynstrið og hevur ans fyri, hvat rörir seg á marknaðinum. Tú hevur hóskandi útbúgving.

**Lön**
Lönin verður ásett sambært avtalu.

**Umsóknir og umsóknarfreist**
Umsóknir við avritum av prógvum og viðkomandi skjölum kunnu sendast við vanligum brævi til Föroya Bjór, Postsmoga 4, FO-710, Klaksvík, ella við teldubrævi til Einar Waag, stjóra, einar@foroya-bjor.fo. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin, 19. februar.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, vinarliga send ein teldupost til Einar Waag, einar@foroya-bjor.fo.

Föroya Bjór

P/f Föroya Bjór er öl- og mineralvatnsvirki, stovnað í 1888. Felagið hevur framleiðslu í Klaksvík og avgreiðslur og goymslur í Klaksvík, Leirvík, Havn, Skálavík og á Tvöroyri. Um 40 fólk starvast hjá P/f Föroya Bjór kring landið.

SENDISTOVAN